# Dúgvan á Tenerife

**Dúgvan, ella Sal Rei, sum gamla ferjan hjá klaksvíkingum eitur nú, liggur í løtuni í Tenerife og er ávegis til Grønhøvdaoyggjarnar, har Dúgvan ætlandi skal røkja innanoyggjasigling. Higartil hevur alt gingið sum ætlað umborð og manningin er sera væl nøgd við skipið**

DÚGVAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið kom gamla Dúgvan, ella Sal Rei, sum skipið eitur nú inn til Santa Cruz á Tenerife. Ferjan er ávegis til Grønhøvdaoyggjarnar, har Dúgvan skal røkja innanoyggjasigling fyri flutningsfyritøkuna S. T. M. Lines.

S. T. M. Lines keypti Dúgvuna fyri 2,2 milliónir krónur.

Pauli Klakkstein, virkandi inspektørur hjá Strandfaraskipum Landsins, er í løtuni á Tenerife, og hann hevur verið umborð á Dúgvuni og prátað við manningina um skipið.

- Teir lata avbera væl at Dúgvuni. Her riggar alt sum tað skal og tá ferðin annars hevur gingið væl, kunnu teir ikki annað enn vera sera væl nøgdir við skipið, segði Pauli Klakkstein úr Tenerife í morgun.

Dúgvan hevur verið í Rotterdam á vegnum til Grønhøvdaoyggjarnar eftir farmi, sum í høvuðsheitum var lastbilar, bilar og traktorar. Tað er nevniliga soleiðis, at fleiri fólk av Grønhøvdaoyggjunum búgva og arbeiða í Rotterdam, og tí var tað eitt upplagt høvi hjá teimum har at fáa sent nakað av frakt beinleiðis heim.

- Nú meðan Dúgvan liggur í Tenerife skal nakað av farmi umborð aftrat, og so verður farið víðari í kvøld ella tíðliga í morgin, segði Pauli Klakkstein, virkandi inspektørur hjá Strandfaraskipum Landsins úr Tenerife í morgun.





*Tað er munur á at liggja Tenerife og røkja innanoyggjasigling á Grønhøvdaoyggjum, og at sigla um Leirvíksfjørð*

*Mynd Pauli Klakkstein*





**Reykjavík**

Galdandi frá 15/08 - 31/12-06



**Flúgv og búgv í Reykjavík**
3 nætur á Hotel Frón

Prísur fyri hvønn í dupultkamari. Eyka fyri einakamar kr. 1.436,-. Íroknað prísin er flogferð, gisting og øll avgjøld

Fríggjadag - mánadag

**3.500,-**

Galdandi frá 15/08 - 31/12-06



**Flúgv og koyr**
B-bilur í 3 dagar

Prísur fyri 2 fólk og bil. Íroknað prísin er flogferð fyri 2 fólk, bilaleiga og øll avgjøld

Fríggjadag - mánadag

**5.450,-**



**Flúgv til Reykjavíkar**
Bara flogferð

Íroknað prísin eru øll avgjøld.
(Bilagt á atlantic.fo)

Prísur úr: **1.862,-**

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo



**SKEMMAN** | søkir handilslærling



## Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

pétur & pétur • 320870

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709

**SKEMMAN**